


# Shell tap uppá 50 mia. kr.

**Jan Müller**

29.10.2015 - 12:40

Oljan.fo

Flestu av stóru oljufeløgunum boða frá stórum tapi í 3. ársfjórðingi. Eitt nú Shell, sum misti 50 milliardir kr. Botnlinjan er myrkareyð.Hetta er ein afturgongd uppá 266%.  Meðan felagið hevði ein vøkstur uppá góðar 30 milliardir sama tíðarskeið í fjør, so er úrslitið nú eitt minus uppá umleið somu upphædd. Shell sigur, at tað fyrst og fremst er lági oljuprísurin, sum er orsøkin, men eisini stóru útreiðslurnar felagið hevur havt til oljuleiting í Alaska og Kanada. Eisini onnur stór oljufeløg hava afturgongd. Eitt teirra er BP og eitt annað Statoil.